# RAKSTRAR- FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN

# FYRI

# 2009

okt. 2008

# Viðmerkingar

# til

# RAKSTRAR- FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN

# fyri rakstrarárið 2009.

## INNGANGUR

Arbeiðið at tilevna uppskotið til rakstrar-, fíggjar- og byggiætlan fyri 2009 hevur m.a. verið merkt av, at seinastu hagtølini fyri elframleiðslu benda á, at vøksturin í elsøluni er um at minka niður í onki og av stórum broytingum í oljuprísunum, sum á sumri 2008 hava verið tað hægsta nakrantíð í søguni hjá SEV. Í oktober 2008 eru prísirnir komnir niðurum aftur tað støðið, sum fíggjarætlanin fyri 2008 bygdi á.
Oljúútreiðslurnar eru í dag meira enn triðingurin av øllum rakstrarútreiðslunum, og hava oljuprís-broytingar tí stóra ávirkan á samlaða úrslitið hjá SEV.
Oljuútreiðslurnar eru hækkaðar úr 25,5 mió. kr. í 1999 til meira enn 70 mió. kr. í 2007. Hettar hevur SEV verið ført fyri at átaka sær, uttan at skula hækka elprísirnar. Men við eini oljuútreiðslu í 2008 upp á yvir 100 mió. kr., varð tað hildið óforsvarligt ikki at hækka elprísirnar tann 1. januar 2008 hartil, at javnvág gjørdist í rakstrinum. Fyri at fáa javnvág í raksturin í 2009 og við atliti at íløgu-tørvinum og jøvnum elprísum yvir longri tíð verður hildið neyðugt aftur at hækka prísirnar frá 1. januar 2009, hesaferð við 4 oyru/kWh.

Av og á er neyðugt at taka framleiðsuverk úr rakstri til kostnaðarmiklar umvælingar, sum eru afturvendandi, men við fleiri ára millumbilum. Teir báðir 2-takt motorarnir á Sundsverkinum verða í 2008 – 2009 tiknir úr rakstri eitt tíðarskeið, meðan elútgerðin verður útskift. Hetta arbeiðið kostar einar 10 mió. kr. í rakstri bæði í 2008 og 2009. Ætlanin varð upprunaliga at seta av í rakstrinum 6,5 mió. kr. til at sandblása og mála vatnleiðingsrørini og rørbrotsventilar á Fossáverkinum í 2008. Hettar varð útsett til 2009. Men orsakað av ymiskum umstøðum kemur henda eyka útreiðsla ikki fyrr enn í 2010.

Høgu oljuprísirnir skunda eisini undir útbygging av varandi orkukeldum. Á íløguætlanini seru settar 58 mió. kr. av til vatnorkuútbygging, 9 mió. kr. til vindorkuætlan og 3 mió. kr. til alduorkuverk-ætlan.
Niðanfyri er í stuttum greitt frá fortreytum og øðrum viðurskiftum, sum dentur er lagdur á í sambandi við áseting av teimum einstøku inntøku- og útreiðslubólkunum. Metingarnar fyri 2009 byggja m.a. á roknskapar- og framleiðslutøl teir fyrstu níggju mánaðirnar av 2008.

## INNTØKUR

Avroknaða elsølan var í 2007 íalt 256,8 mió. kWh og framleiðslan var íroknað keypta vindorku-framleiðslu 269,4 mió. kWh. Eginnýtslan, tap í býtisvirkjum og forskjótingar í uppgerðartíðar-skeiðum vóru sostatt tilsamans 4,7% av framleiðsluni í 2007.
Í 2008 verður roknað við 2 % størri elsølu enn árið fyri.
Harafturat verður bæði í 2008 og 2009 roknað við, at 6% av framleiðsluni fer til tap í býtisvirkjum og eginnýtslu. Hettar svarar til meðaltalið fyri seinastu 3 árini.
Framleiðsluhagtølini fram til og við september 2008 benda á, at vøksturin, sum hevur verið í el-nýtsluni síðani 1996 og fram til fyrru helvt av 2008 tó við ávísari minking í 2005, nú er hasaður av og er kanska um at steðga upp.
Í rakstraræ tlanini fyri 2009 verður sum grundarlag undir metingum um inntøkurnar roknað við, at nýtsluvøksturin verður 2% frá 2007 til 2008, men ongin vøkstur frá 2008 til 2009.

Meðal avroknaði elprísurin var í 2007 uml. 90 oyru/kWh. Fyri bæði 2008 og 2009 verður roknað við sama lutfalsliga býti millum teir ymisku kundaprísbólkarnar, men í 2008 er prísurin 10 oyru/kWh hægri enn í 2007, og frá 1. januar 2009 verður prísurin hækkaður 4 oyru/kWh afturat.

Út frá frammanfyri standandi verður elsølan í 2008 uml. 258 mió. kWh og verður samlaða inntøkan íroknað fast gjald, íbindingargjøld o.a. mett til 276,4 mió. kr. í 2008.
Við ongum vøkstri í elsøluni og eini elpríshækking upp á 4 oyru/kWh fyri bæði vanligar kundar og ídnaðarprískundar verður roknað við, at samlaðu inntøkurnar verða uml. 287 mió. kr. í 2009.

## ÚTREIÐSLUR

**Rakstrarútreiðslurnar** eru ásettar út frá metingum um teir einstøku útreiðslubólkarnar. Hædd er tikið fyri avtalaðu lønarhækkingunum, so roknað verður við uml. 47,15 mió. kr. til lønir í rakstr-inum í 2009 fyriuttan lønir undir fyrisiting (jbr. niðanfyri). Tilfar og tænastuveitingar, herundir eykalutir til elverkini og kaðalar, transformarar o.a.m. til linjurakstur verður mett til 46,66 mió. kr.

**Fyrisitingarútreiðslurnar** eru ikki bert til fyrisiting, men ein munandi partur av hesum útreiðslum fara til onnur felags endamál, m.a. eftirlønt starvsfólk, frammanundankanningar, tryggingar og arbeiðsmarknaðargjøld. Harafturat kemur tap upp á skuldarar og ymiskar felagsútreiðslur annars.
Tapið upp á skuldarar hevur verið lutfalsliga lágt seinastu árini. Í 2004 bert 0,2 mió. kr., í 2005 uml. 0,3 mió. kr. og í 2006 uml. 0,2 mió. kr. og í 2007 0,1 mió. kr. Í rakstraræ tlanini fyri 2009 eru av-settar 0,5 mió. kr. til tap upp á skuldarar.
Í búskaparligum afturgangstíðum hevur hettar talið lyndi til at vaksa, og kunnu tá 0,5 mió. kr. skjótt gerast ov lítið.
Av samlaðu fyrisitingarútreiðslunum verður roknað við, at 11,45 mió. kr. fara til lønir, eftirlønir og samsýningar í 2009.

**Orkukeyp**

Roknað verður við, at SEV sambært avtalu við Sp/f Røkt í Vestmanna fer at keypa vindorkuframleidda elmegi upp á uml. 7,2 mió. kWh fyri 0,40 kr./kWh.
Hettar gevur eina útreiðslu til orkukeyp upp á uml. 2,9 mió. kr.
Hædd er tikin fyri hesum orkukeypi í framleiðsluni á Sundsverkinum og harvið sparing í oljuútreiðslum. Eisini er hædd tikin fyri, at vindorkan, sum SEV sjálvt framleiðir, verður 7,85 mió. kWh í 2009.

**Oljuútreiðslurnar verða í 2009 mettar at vera 97,3 mió. kr**. Tá er roknað við vøkstri í framleiðsluni sum nevnt frammanfyri. Roknað er við eini vatnorkuframleiðslu upp á 95 mió. kWh, vindorkuframleiðslu uppá 7,85 mió. kWh og termiskari framleiðslu uppá 163,9 mió. kWh. Harafturat er sum nevnt roknað við keyptari vindorkuframleiðslu upp á 7,2 mió. kWh.
Oljuprísirnir eru broyttir óvanliga nógv seinastu tvey árini, bæði upp og niður, tó mest uppeftir. Seinasta summar vóru prísirnir komnir upp á tað hægsta nakrantíð, men eru nú á heysti 2008 komnir nakað niðuraftur.
Út frá meðal tungoljuprísunum fyri oktober 2008 verða oljuútreiðslurnar hjá SEV íroknað smyrjioljur, dieselolju og flutningsútreiðslur til útoyggjarnar mettar at vera 97,3 mió. kr. í 2009. Hettar svarar til umleið 34% av øllum útreiðslunum hjá SEV. Tí fær tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísunum verður munandi annarleiðis enn tað, ið mett er í rakstrarætlanini.
Fyri at undirstrika týdningin av oljupríshækkingini skal vísast á, at í 2005 brúkti SEV fyri 49,3 mió. kr. til oljukeyp svarandi til 24% av øllum útreiðslunum tað árið móti umleið 36 % í 2008.

**Rentuútreiðslur** og **avdráttir** av lánum eru mett út frá galdandi lániavtalum og metingum um rentubroytingar. Roknað er við kr. 60 mió. kr. í nýggjari lánitøku í 2009.
Talan er um netto rentuútreiðslur, har rentuinntøka av tøka peninginum er við.
Íløgurnar í 2009 verða fíggjaðar av nevndu lántøku umframt av gjaldførinum og av rakstrarískoytinum.

**Avskrivingarnar** eru settar til 50 mió. kr.
Hettar er út frá somu avskrivingarprinsippum, sum í 2007.
Fjarskiftiseftirlitið arbeiðir í løtuni við at gera nýggjar roknskaparreglur, herundir avskrivingarreglur fyri SEV, og eigur hettar tal at verða endurskoðað, tá ið nýggjar avskrivingarreglur eru settar í verk.

**Íløgurnar** eru settar til 106,3 mió. kr. í 2009, herav 80,1 mió. kr. til framleiðsluvirkir (bæði til útbygging av vatn- og vindorku) og 15,8 mió. kr. til býtisvirkir.

Ávís óvissa er viðv. tíðarætlanini fyri onkrar av ætlaðu íløgunum. Sum dømi kann nevnast, at til vatnorkuútbyggingina í Eysturoy "Eiði II", sunnara part skulu loyvisgevandi myndugleikar, herundir friðingarmyndugleikar, hava ta tíð, teimum tørva til at viðgera málið. Málið hevur drigið út, í seinastuni serstakliga orsakað av viðgerðini í Yvirfriðingarnevndini.

Byrjað varð upp á norðara part av "Eiði II" í fjør, og eru avsettar 37 mió. kr. í 2009 til tað. Til "Eiði II", suður eru avsettar 20 mió. kr., men verður hesin peningur helst einans brúktur til fulnar, um loyvi fæst til byggiætlanina innan árslok 2008.

---------------------------------------

**Tórshavn í oktober 2008**

**Elfelagið SEV**

# RAKSTRARÆTLAN FYRI 2009 (í 1000 kr)

## INNTØKUR:

**Ætlan 2008:**

| | | |
|---|---|---|
| 258.554 | Streymgjald | 267.100 |
| 15.500 | Fast gjald | 15.900 |
| 2.000 | Íbindingargjald | 2.000 |
| 2.000 | Ómaksgjøld v.m. | 2.000 |
| **278.054** | **Inntøkur** | **287.000** |

## ÚTREIÐSLUR:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 103.000 | **Olja til elverk og bygningar** | | **97.300** | |
| 2.900 | **Orkukeyp** | | **2.900** | |
| | Rakstrarútreiðslur: | | | |
| 22.100 | Framleiðsluv. v.m.,løn | 24.100 | | |
| 17.200 | Framleiðsluv. v.m., tilfar og veitingar | 30.400 | | |
| 800 | Bygningar, løn | 800 | | |
| 7.650 | Bygningar, tilfar og veitingar | 3.500 | | |
| **47.750** | **Framleiðsluv. og bygningar íalt** | | **58.800** | |
| 19.600 | Býtisvirkir, løn | 22.250 | | |
| 16.800 | Býtisvikrir, tilfar og veitingar | 12.760 | | |
| **36.400** | **Býtisvirkir íalt** | | **35.010** | |
| 10.300 | Fyrisiting v.m., løn | 11.450 | | |
| 15.250 | Fyrisiting, tilfar og veitingar | 16.700 | | |
| **25.550** | **Fyrisiting íalt** | | **28.150** | |
| **4.100** | **Renta, netto** | | **6.900** | |
| **10.000** | **Eyka rakstrarútreiðslur** | | **0** | |
| **229.700** | | | | **229.060** |
| **48.354** | Úrslit áðrenn avskrivingar | | | **57.940** |
| 50.000 | **Avskrivingar, rakstrargøgn** | | **50.000** | |
| | | | | **50.000** |
| **(1.646)** | **Rakstrarúrslit** | | | **7.940** |

# FÍGGJARÆTLAN FYRI 2009 (í 1.000 kr.)

**Ætlan 2008:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 48.354 | Gjaldførisískoyti frá rakstrinum | | 57.940 |
| (500) | Broyting, skuldarar | | (500) |
| 500 | Broyting, ognarar | | 500 |
| (2.000) | Broyting, goymslur | | (1.000) |
| 200 | Broyting, annað | | 200 |
| 46.554 | | | 57.140 |
| 114.900 | Íløgur | 106.300 | |
| 0 | Lántøkur | 60.000 | 46.300 |
| (68.346) | | | (10.840) |
| 19.100 | Goldnir avdráttir | | 20.300 |
| | | | (9.460) |
| 113.000 | Ágóði við ársbyrjan | | 35.000 |
| **25.554** | **Ágóði við ársenda** | | **25.540** |

**BYGGIÆTLAN 2009 (í 1.000 kr.)**
**jbr. hjáløgdu útgreiningar**

| | 2008 | | 2009 |
|---|---|---|---|
| 1. | 49.700 | Býtisvirkir | 15.800 |
| 2. | 49.400 | Framleiðsluvirkir | 80.100 |
| 3. | 6.800 | Koblingsstøðir | 1.000 |
| 4. | 9.000 | Nýútvegan, ymiskt | 9.400 |
| | **114.900** | | **106.300** |

# Byggiætlan 2008, útgreiningar

**Ad 1. Býtisvirkir:**

| | |
|---|---|
| Trafostøðir | 3.300 |
| 10 + 20 kV | 9.000 |
| Lágspenningur | 700 |
| Íkomin mál | 2.000 |
| 60 kV Klaksvík | 800 |
| **Íalt** | **15.800** |

**Ad. 2. Framleiðsluvirkir:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Vatnorkuútbygging, Eiði 2-norð | 37.000 |
| 2. | Vatnorkuútbygging Eiði 2-suður | 20.000 |
| 3. | Vatnorkuútbygging, Víkarvatn | 1.000 |
| 3. | Vindorkuútbygging | 9.000 |
| 4. | Battarískipan, Koltur | 1.000 |
| 5. | Alduorka | 3.000 |
| 6. | Elverk, ymiskt og smáverk v.m. | 6.800 |
| 7. | El-tøkni, elverk | 2.300 |
| | **Íalt** | **80.100** |

**Ad 3. Bygningar, o.a.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Háspeningsútgerð á verkinum í Trongisvági liðugtgerð | **1.000** |

**Ad 4. Nýútvegan, ymiskt:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Amboð og aggregat | 2.000 |
| 2. | Málitól | 300 |
| 3. | Innbúgv | 700 |
| 4. | Samskiftisútgerð | 400 |
| 5. | Eltøkni | 100 |
| 6. | Fjarstýring | 80 |
| 7. | Akfør | 1.400 |
| 8. | EDV | 1.800 |
| 9. | Fjaravlestur, málarar | 2.500 |
| 10. | Ymiskt | 120 |
| | **Íalt** | **9.400** |

## GJALDSKRÁ GALDANDI FRÁ 1. JANUAR 2009 (uttan MVG):

| **Brúkarastødd** (kWh/ár): | **Fast gjald** (kr./ár): | **Nýtslugjald** (kr./kWh): |
|---|---|---|
| Upp til 10.000 | **480,00** | **1,25** |
| 10.000 til 100.000 | **1.280,00** | **1,17** |
| yvir 100.000 | **5.280,00** | **1,13** |

## ÍDNAÐUR, FISKIVINNA, LANDBÚNAÐUR V.M. SAMBÆRT VINNUGREINASKIPANINA HJÁ SEV:

| **Brúkarastødd** (kWh/ár): | **Fast gjald** (kr./ár): | **Nýtslugjald** (kr./kWh): |
|---|---|---|
| Upp til 10.000 | **480,00** | **1,25** |
| 10.000 til 20.000 | **1.280,00** | **1,17** |
| yvir 20.000 | **9.080,00** | **0,78** |